**Familjupolitikkur**

Arbeiðið er stórur partur av gerandisdegnum hjá eini familju. Tí hevur tað stóran týdning, at arbeiði og heimalív sampakka.

**Endamál**

Endamálið er at geva einstaka starvsfólkinum rúmd fyri bæði arbeiði og heimalívi.

**Karmar og mentan**

Smidligir karmar eru neyðugir, men ikki altíð nóg mikið at røkka endamálinum um eitt familjuvinarligt arbeiðspláss. Mentanin á arbeiðsplássinum eigur at stuðla undir familjupolitikkin.

Tað liggur á leiðsluni og starvsfólkunum í felag at tryggja at so er. Her eru m.a. starvsfólkasamrøður eitt týdningarmikið amboð.

**At leggja arbeiðiðtil rættis**

Bæði leiðsla og starvsfólk eiga at vera lagalig og smidlig,  tá arbeiðið verður lagt til rættis.

Tað liggur á leiðsluni at skipa so fyri, at fleiri enn ávísa starvsfólkið duga at røkja uppgávur, ið ikki kunnu liggja óloystar vegna forfall av sjúku ella fráveru.

**Skiftitíðir/flekstíð**

Starvsfólk eiga at hava møguleika fyri at arbeiða í skiftitíðum/flekstíð.

Um arbeiðsuppgávurnar loyva tí, skal tað til tíðir bera til at arbeiða heima.

**At broyta arbeiðstíð**

Lívsskeiðið hjá starvsfólkum broytist gjøgnum eitt langt arbeiðslív. Arbeiðsplássið eigur at ganga grundaðum ynski um at broyta arbeiðstíðina ávíst tíðarskeið á møti.

Hetta eigur ikki at forða fyri møguleikanum fyri fakligari og persónligari menning á arbeiðsplássinum ella darva møguleikanum fyri framflyting.

**Yvirtíð**

Yvirtíð eigur at verða avmarkað. Til dømis eiga fundir ikki at verða lagdir uttan fyri vanliga arbeiðstíð, uttan so at tað er alneyðugt.

**Frítíð og frídagar**

Tá frítíð og frídagar verða løgd til rættis, má atlit verða tikið at tørvinum hjá arbeiðsplássi og starvsfólki.

Leiðslan eigur saman við starvsfólkunum at leggja frítíð og frídagar lagaliga til rættis.

**Børn á arbeiðsplássinum**

Um arbeiðsumstøðurnar loyva tí, kunnu starvsfólk  hava børn við til arbeiðis einstakar løtur.